FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208

Tórshavn, tann: 7. des. 2023
J. nr.: 23/02889
Viðgjørt: TM, BAB

Viðvíkjandi løgtingsmáli nr. 41/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi (Avgjøld á f-gass og ávísar rættingar í vørunumrum og øðrum)

Fíggjarmálaráðið er vorðið varugt við eitt mistak, sum er komið í frumskjal 1 til toll- og vøruskránna, sum er í skjali 1 í løgtingslógini. Eg fari tí at mæla Fíggjarnevndini til at gera eina broyting í lógaruppskotinum.

Uppskot til orðing av broytingaruppskotið:

Í skjali 1, kap. 22, verður punkt avgjaldið á "180,00 kr. pr. ltr." fyri vørunummur

2206.00.31
2206.00.39
2206.00.51
2206.00.59
2206.00.81
2206.00.89
2206.00.90

broytt til: "180 kr. pr. litur reint alkohol."

Viðmerking:
Í galdandi løgtingslóg nr. 19 frá 12. mars 2002 um avgjald á framleiðslu og innflutningi hava nevndu vørunummur omanfyri punkt avgjald á *180 kr. pr. litur reint alkohol*. Hetta er rætta avgjaldið, sum tað hevur verið síðani 2017. Ætlanin hevur ikki verið at broyta hetta avgjaldið.

Av onkrari orsøk er komið at standa *180,00 kr. pr. ltr.* í punkt avgjaldi fyri hesi vørunummur í uppskotinum til løgtingslóg, sum Fíggjarmálaráðið hevur latið Løgtinginum. Hetta er eitt mistak, og Fíggjarmálaráðið mælir við hesum Løgtingsins Fíggjarnevnd til at broyta punkt avgjaldið fyri hesi vørunummur í uppskotinum til *180 kr. pr. litur reint alkohol*, sum er punkt avgjaldið í dag.

Tórshavn, 7. desember 2023

Ruth Vang
landsstýriskvinna í fíggjarmálum